# Jákup Suni gevst í politikki

**Stóri atkvøðuslúkarin við seinasta býráðsval í Havn, Jákup Suni Joensen, stillar ikki upp til býráðsvalið í heyst. Hann sigur seg vera noyddan at velja millum vinnulív og politikk, og hugurin er meira til vinnulívið**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*



*Heldur byggivirksemi enn politikk. Jákup Suni Joensen hevur upplivað nóg mikið av politikki á hesum sinni og gevst í politikki.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Oftani verður sagt, at vinnulív og politikkur ikki ganga væl í hond.

Jákup Suni Joensen, býráðslimur í Havn og fyrrverandi tingmaður, er bæði vinnulívsmaður og politikari. Men tað ætlar hann ikki at halda fram við. Seks ára royndir í politikki hava ikki givið honum hug at halda fram.

– Tað er ikki hugsandi, at eg stilli upp til býráðsvalið í heyst.

– Býráðsarbeiði er alt ov funktionelt fyri meg. Tað hendir alt ov lítið. Mann følir oftani, at mann koyrir í tómgongd, sigur Jákup Suni Joensen, tá spurt verður eftir grundgevingini fyri, at hann hevur valt at gevast í politikki.

## Vinnulív v. býráð

Til dagligt er Jákup Suni Joensen eigari og leiðari fyri Sp/f Bulur, sum fæst við byggivirksemi. Og tað er hetta virksemið, ið Jákup Suni velur fram um býráðspolitikk - umframt landspolitikk.

– Tú kanst ikki tæna tveimum harrum. Tú fært ikki gjørt alt, tú hevur sett tær fyri. Eg haldi, at tú verður ein vánaligari vinnulívsmaður av at vera í politikki, sigur Jákup Suni Joensen, sum kortini ikki vil gera viðmerkingar til, um aðrir býráðslimir í líknandi støðu eiga at taka somu avgerð sum hann.

Fyri Jákup Suni er tað bæði ein spurningur um at vera hundrað prosent til staðar, har hann er, og ikki minst tær drúgvu mannagongdirnar í býráðsarbeiði, ið gera, at hugurin at halda fram er so gott sum heilt burtur.

– Eg valdi at royna býráðspolitikk, men tað varð ikki, sum eg hevði roknað við.

– Vanliga eri eg privatur vinnurekandi, og tá eg eri við til at avgera tingini. Í politikki mást tú boyggja teg fyri meirilutanum, sigur Jákup Suni Joensen.

Stutta frástøðan í vinnulívinum millum fyrisitingarligu avgerð og gerð er langt frá veruleikanum í kommunalum arbeiði, heldur Jákup Suni.

– Avgerðirnar eru ótrúliga umsitingarligar. Tú tekur eina politiska avgerð, men tað umsitingarliga er ógvuliga umfatandi og stórt, og tað riggar ikki so væl til mín. Tú ert bara leikmaður - ikki fakmaður. Tað skalt tú ikki blanda saman, sigur Jákup Suni Joensen.

Sum partur av fólkafloksumboðanini í Tórshavnar býráð hevur Jákup Suni fingið formanssessin í Havnanevndini litið upp í hendi, men hendan sess hevur hann ikki røkt seinastu tíðina.

Men hóast hann velur at gevast, so sigur Jákup Suni seg hava lært nógv hesi árini.

## Atkvøðuslúkari

Í 2002 tók Jákup Suni Joensen seg úr landspolitikki. Tvey ár undan gjørdist hann toppskoraði á býráðsvalinum í Havn við góðum 350 atkvøðum. Harav vóru góðar 280 atkvøður fingnar til vega í heimbygdini Kollafirði. Hetta var fyrstu ferð, at kollfirðingar skuldu á val saman við fólki í Havn í nýggju samanløgdu kommununi. Men stóri persónligi stuðulin seinast og góðu útlitini fyri at verða afturvaldur fáa ikki Jákup Suna at broyta meining.

Jákup Suni Joensen er 45 ára gamal, og hann megnar at fylla 46, áðrenn komandi kommunal verður hildið. Hesi seinastu árini, sum Jákup Suni hevur umboðað kollfirðingar í býráðnum, er hann eisini væl nøgdur við.

– Kollafjørður hevur fingið øgiliga nógv burturúr at vera í Tórshavnar kommunu. Íløgur eru gjørdar fyri einar tjúgu milliónir. Vit her norðuri hava fingið tað, vit fóru eftir, sigur Jákup Suni Joensen, ið seinastu fýra árini hevur verið einasti kollfirðingur í býráðnum - og eisini partur av meirilutanum.

Serliga tað, at gongd er komið á at fáa ítróttahøllina liðugt bygda, er Jákup Suni nøgdur við, tá júst hetta málið er eitt hjartamál hjá honum og hjá flest øllum kollfirðingum.

Hóast vit royna dúgliga, so vil Jákup Suni ikki siga so nógv um, hvar hann roknar við, at hansara "leysur" atkvøður fara at enda í heyst, men hann heldur, at Fólkaflokkurin eigur at hava góðar møguleikar at endurvinna góða úrslitið fyri fýra árum síðani.

Higartil hevur ikki nógv verið at frætt í býráðsvalið í Havn. Onkur nýggjur listi hevur spøkt, og í Javnaðarflokkinum er stríð millum báðar býráðslimirnar hjá flokkinum. Men uppstillingarfundir hava ikki verið nakað at hoyrt til, men væntandi kemur glið á hetta ikki so heilt leingi eftir summarfrítíðina. Atkvøðuslúkarin í Kollafirði heldur avgjørdur, at tað hevði komið væl við hjá kommununi og býráðnum, um fleiri kvinnur vórður valdar í heyst.

– Eg havi einki ímóti at fáa fleiri konufólk í býráðið. Tey bleytu virðini verða forsømd við ov nógvum monnum. Vit hugsað kanska ov nógv um tøl og útboð og eftirspurning, sigur Jákup Suni Joensen.

## Fremsti skal vera borgarstjóri

Við flestum persónligum atkvøðum á fólkaflokslistanum til seinasta býráðsval, vóru tað fleiri, sum roknaðu við, at Jákup Suni Joensen fór at gerast borgarstjóri í Tórshavnar kommunu. Jákup Suni sigur, at politiska telvingin fylgir langt frá altíð nøkrum tílíkum meginreglum.

– Skuldi eg verið borgarstjóri, so sat eg í andstøðu, sigur Jákup Suni Joensen, sum tá fekk skotið í skógvarnar, saman við Bjarta Mohr, at politisku royndirnar vantaðu.

Men vinnulívsmaðurin úr Kollafirði situr ikki syrgin og forsyndaður eftir.

– Eftir hesi árini í býráðnum, so kundi eg satt at siga ikki hugsað mær at verið borgarstjóri. Tú ert alt ov nógv ein kransakøkufigurur, og tað er riggar ikki til mín, sigur Jákup Suni Joensen.

Verður úrslitið við valið í heyst nakað líkt tí seinast, og ein líknandi støða viðvíkjandi borgarstjóraspurninginum tekur seg upp, so heldur í øllum førum Jákup Suni Joensen, at tað kundi verið upp á pláss, at tann við flestum persónligum atkvøðum eisini gerst borgarstjóri.

Àvísir føroyskir politikarar hava seinnu árini duga væl at lata frætta, at teir ikki stilla upp til val, men fyri síðani at broyta hugsan og brádliga endurvinna hugin og viljan at stilla upp. Men Jákup Suni Joensen vil ikki koyrast í hendan bás.

– Tá eg sigi nakað, so meini eg tað. Alt annað er ikki tann, eg eri, sigur Jákup Suni Joensen.

ítróttur
Nr. 137 • mikudagur • 21. juli 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Skelkaður av viðferðini

**Danin Martin Christensen hevði eitt framúr kappingarár í HB í fjør. Í ár hevur ikki gingið eftir vild, og fyri tveimum vikum síðani bleiv Martin púra óvæntað uppsagdur av HB. Nú er danska Spillerforeningen komin upp í málið**

*Martin Christensen er sera glaður fyri arbeiðið hjá Húsavarðatænastuni, men sigur samstundis, at tað er krevjandi likamliga, og tískil ein av høvuðsorsøkunum til, at tað gongur striltið við at koma fyri seg eftir skaða*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



ÓSEMJA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað er einki dulsmál, at ein tann mest týðandi leikarin á gull-liðnum hjá HB í fjør, var danski miðvallarin Martin Christensen. Í ár hevur Martin ikki leikt serliga nógv á besta liðnum hjá havnarfelagnum, tí at hann hevur verið so nógv darvaður av skaða. Hetta førdi við sær, at HB fyri tveimum vikum síðani segði sáttmálan við danska miðvallaran upp, og hetta kom ógvuliga óvart á danska miðvallaran, sum kennir seg snýttan av havnarfelagnum.

## Havi yvirhildið sáttmálan

Í sambandi við uppsøgnina hevur leiðslan í HB lagt dent á, at Martin Christensen ikki hevur yvirhildið tær avtalur, ið blivu gjørdar í sambandi við, at sáttmáli bleiv undirskrivaður fyri hetta kappingarárið. Millum annað hevur verið borið fram, at danin varð skaddur, tá ið hann kom aftur til Føroya í vetur, men hetta avsannar Martin Christensen. – Eg veit, at HB hevur nýtt tríggjar grundgevingar fyri uppsøgnini, men eg havi skrivlig prógv fyri, at ongar av hesum grundgevingum halda, sigur hann.

Sjálvur var Martin Christensen ógvuliga ovfarin, tá ið hann bleiv kallaður á fund við leiðsluna í HB fyri tveimum vikum síðani, har hann fekk at vita, at hann sambært leiðsluni í HB ikki hevði yvirhildið sáttmálan, og tí bleiv hann uppsagdur. Sambært Martin Christensen hevði lítið og einki samskifti verið millum seg og leiðsluna í HB í drúgva tíð frammanundan, og tí kom tað ógvuliga óvart á hann, at samstarvið skuldi enda so bráddliga. – Eg hevði mett, at um leiðslan í HB ikki var nøgd við meg, so hevði tað verið náttúrligt at sett seg niður og tosað um tingini, soleiðis at vit møguligani kundu fingið tað í rættlag, sigur Martin Christensen, sum nú hevur fingið donsku Spillerforeningen upp í málið.

## Fakfelagið er ikki í iva

Spillerforeningen, sum er fakfelagið hjá Martin Christensen, er ikki í iva um, at danin ikki uttan víðari kann sigast upp. Felagið hevur sent HB eitt skriv, har teirra sjónarmið verða lýst, og sambært Martin Christensen hevur felagið gjørt greitt, at sáttmálin hjá honum kann ikki sigast úr gildi uttan so, at báðir partar eru samdir um tað. Felagið vil verða við, at málið er púra upplagt, og at HB noyðist at uppfylla tær treytir, sum eru settar í sáttmálanum.

Komandi mánadag eru tey bæði, Martin Christensen og unnustan Sabine Frølund, uppsøgd úr húsi sínum, sum HB hevur útvegað teimum í sambandi við sáttmálan, men eisini hetta skal, sambært donsku Spillerforeningen, verða heimildarleyst. Frá umboðum fyri danska fakfelagið hava tey bæði fingið at vita, at tey kunnu fara á gistingarhús at búgva upp á rokning hjá HB, so leingi sum Martin er sáttmálabundin at felagnum, og tað er hann fram til 4. oktobur í ár, tí tað stendur tilskilað í sáttmálanum, at havnarfelagið útvegar dananum og unnustuni íbúð í sáttmálatíðuni. Danska fakfelagið sigur sambært dananum eisini, at hóast Martin Christensen hevur rætt til løn fyri alt sáttmálatíðarskeiðið, so hevur hann samstundis krav upp á sítt spæliloyvi beinan vegin, tá ið HB hevur sagt sáttmálan upp.

Martin Christensen sigur eisini, at tað mest vanliga í slíkum førum, har eitt felag vil sleppa sær av við ein leikara, er, at felagið og leikarin gera eina semju, sum báðir partar kunnu liva við, men hetta er so ikki hent í hesum føri. – Mær hevði dámt nógv best, at HB segði við meg, at teir ikki vóru nøgdir við meg og mítt avrik, og at teir fegnir vildu sleppa av við meg. So høvdu vit sett okkum niður og møguligani gjørt eina semju, og tað hevði samstundis merkt, at vit framvegis høvdu verið væl. Sum støðan er nú, eri eg ógvuliga beiskur inn á HB, og tað harmar meg almikið, at okkara samstarv skal enda so, tí eg havi havt nógvar góðar upplivingar í felagnum, sigur Martin Christensen.

## Hevur fleiri tilboð

Enn hevur Martin Christensen ikki gjørt av, hvar leiðin nú gongur, men hann sigur seg hava fleiri tilboð, bæði úr Føroyum og úr Danmark. Tó sigur unnustan Sabine, at hon helst vil aftur til Danmarkar, tí upplivingin í sambandi við uppsøgnina av Martin hevur verið rættuliga ódámlig, og hon vil tí fegin sleppa burtur at fáa luft, sum hon málber seg.

Danski miðvallarin ásannar, at hann hevur verið nógv darvaður av skaða, men hann sigur seg eisini hava gjørt nógv, millum annað fingið fleiri sproytir, fyri at blíva klárur. Støðugt hevur hann gingið til viðgerð hjá fysioterapeuti, men tað hevur tó ikki eydnast honum at koma ordiliga fyri seg í ár.

Ein av orsøkunum til trupulleikan við at koma fyri seg eftir skaða sigur Martin Christensen verða krevjandi arbeiði. Hann sigur, at í fjør arbeiddi hann í Litaval á Hjalla, og tað var frálíkt, tí tað var ikki so krevjandi kropsligt. Ætlanin var eisini, at hann skuldi halda fram har uppi, men stutt undan fráferðini til Føroya í vetur, fekk Martin at vita, at hann ístaðin skuldi arbeiða sum timburmaður, ið hann eisini hevur útbúgving sum. Tað hevur tó víst seg, at timburarbeiði, sum Martin annars er sera glaður fyri, krevur nógv av kroppinum, og tað forðar skaðanum at grøðast sum skjótast, sigur Martin Christensen, ið eisini hevði sama trupulleika við arbeiði og skaða, tá ið hann spældi í Danmark.

Tey bæði, Martin og Sabine, siga, at síðstu vikurnar hava verið ein ógvuliga trupul tíð, men Martin sigur samstundis, at tað hevur hjálpt nógv at havt tveir góðar mans at tosa við. Hann nevnir í hesum sambandi, at arbeiðsgevari hansara, Sámal Erik Hentze frá Húsavarðatænastuni, og hjálparvenjarin hjá HB, Oddbjørn Joensen, hava verið honum kærir.

## Uppsøgnin galdandi

Vit settu okkum eisini í samband við leiðsluna í HB, men har vildu teir ikki gera tær stóru við merkingarnar til málið. Steinfinn Mittelstein, stjóri í Havnar Fótbóltur, sigur tó, at eftir teirra tykki hevur Martin brotið sáttmálan, og tí er uppsøgnin galdandi. Teir harmast sjálvsagt um gongdina, men vísa annars á, at sakførari felagsins arbeiðir við málinum víðari.